TK Stovan

KUNNINGARFUNDUR:
Krøv til ein veitara á "World Class" støði

Mánadagin 7. mai kl. 13.00 á Hotel Føroyum

Krøv til veitarar, sum vilja gera seg galdandi uttanlands og her heima

TK Stovan skipar fyri kunningarfundi um krøvini til ein "World Class" veitara, og tekur sum dømi um krøv herheima, Atlantic Supply Base, sum fer at kunna um, hvørjar treytir og krøv, teir seta sínum veitarum.

Tiltakið er bæði fyri fyritøkur innan oljuvinnu og aðrar fyritøkur.

Kristian Stokbro, aðalráðgevi hjá Dansk Industri kemur við útgangsstøði í donskum viðurskiftum at røða um, hvørji krøv verða sett veitarum, nú og í framtíðini. Hann kemur inn á nógv hugtøk, tíðarrák, dømir og hvussu tú kanst tryggja tær at verða í fremstu rød sum veitari í framtíðini.

Lassi Borðoy, nýliga settur stjóri á veitingarstøðini á Skálafjørðinum, Atlantic Supply Base (ASB), kemur at røða um, hvørji krøv útgerðahavnin kemur at seta sínum veitarum. Hann kunnar eisini meira alment um ASB.

Fundurin er býttur upp, soleiðis, at Kristian Stokbro greiðir frá sínum evnum í tríggjar tímar. Eftir hann greiðir Lassi Borðoy frá ASB í ein góðan hálvan tíma. Møguleiki verður at seta spurningar og fyri stuttum tjaki.

Skrá fyri fundin:

Kl. 13:00 TK Stovan bjóðar vælkomin
Hvussu verður tú ein "World Class" veitari?
v/Kristian Stokbro, chefkonsulent, Dansk Industri:
Kl. 13:10 Hvar er kappingarstyrkin hjá fyritøkuni?
Kl. 13.25 Hugsa tær, at ein "stór-kundi" kemur á vitjan?
Kl. 13.40 Luttakararnir fáa vitjan! Prát í smábólkum.
Kl. 13.50 Steðgur
Kl. 14:05 Bólkaprát og kjak
Kl. 14.30 Krøv til veitarar á World Class støði
Kl. 14.40 Outsourcing – at leggja virksemi uttanfyri fyritøkuna
Kl. 14.55 Steðgur
Kl. 15.10 Vit byggja eitt "World Class" hús
- Leiðsla
- Áhaldandi læring
- Áhaldandi betranir og at arbeiða í toymi (teams)
- Tær røttu og feilfríu vørurnar
- Logistik – mannagongdir í samband við vørur og upplýsingar
- Útnyttan av framleiðsluorku
- Hvussu kemur fyritøkan víðari

Kl. 16.00 Steðgur
Krøv til veitarar v/ Lassa Borðoy, stjóra á Atlantic Supply Base
Kl. 16:10 Kunning um Atlantic Supply Base, og hvussu teir koma at arbeiða
Kl. 16:45 Spurningar og møguligt tjak
Kl. 17:00 Liðugt

Tilmelding: TK Stovan, fax nr. 31 93 63, tlf. nr. 31 73 66 ella teldupost tk@tk.fo
Kostnaður: kr. 700,00 u/mvg
Tilmelding í seinasta lagi **fríggjadagin tann 4. mai k. 12.00**

Virkisnavn:_____Tal av luttakarum:_____

Navn/Nøvn:_____

_____

Tlf:_____Fax:_____

TK Stovan
Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn
Tel +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
www.tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR
TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnulívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.

Ársaðalfundur

Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag hevur ársaðalfund Kristi himmalsferðardag, 24. mai 2001 kl. 15.00 í Meinigheitshúsinum í Sandavági.

Fundarskrá:
1. Ársfrágreiðing
2. Ársroknskapur
3. Val av nevndarlimum
4. Val av tiltakslimi
5. Val av grannskoðara
6. Ymiskt

Uppskot, sum limir ynskja at koma til viðgerðar á aðalfundi, og uppskot til nevndarlimir mega vera formanninum, Una Næs, 530 Fuglafjørður, í hendi 8 dagar framman undan aðalfundinum.

Í samband við aðalfundin verður eisini alment møti í meinigheitshúsinum í Sandavági kl. 18.00.

Nevndin

Starvslýsing

Vit søkja einum tilkomnum fólki, at byrja hjá okkum sum skjótast.

Ætlanin er, at viðkomandi skal taka sær av sølu og innkeypi hjá Náttúrudeildini. Eisini skal viðkomandi hjálpa til á goymsluni, tá á stendur.

Vit vænta, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hevur lætt við at samskifta við onnur. Hevur áhuga í landbúnaði og fiskivinnu.

Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir innan sølu, hettar er tó eingin treyt. Hevur tú tað stóra koyrikortið er tað ein fyrimunur.

Fyri rætta viðkomandi er talan um eitt starv, har bara títt hegni og árræði setur avmarkingarnar fyri avbjóðingini.

Allar umsóknir skulu sendast til P/f Thomas Dam Heilsøla, Box 2148, 165 Argir.

Meiri fæst at vita við at ringja til okkara á tlf. 311400.

P/F Thomas Dam á Hálsi

Ársaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá TB verður í TB-húsinum tann 16. mai kl. 19.00.

Nevndin

Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!

Við Sosialinum
Í BÝIN

Sosialurin fer í býin hvørja viku og tú sleppur at fylgja við hvussu hetta spælir av

Les í býin hvønn hósdag !

TELDUSTØÐINGAÚTBÚGVING
(Datamatikaraútbúgving)

Mánaðarskiftið august/september 2001 byrjar nýggjur teldustøðingarflokkur á Føroya Handilsskúla, um nóg nógvir egnaðir umsøkjarar verða.

Teldustøðingaútbúgvingin verður roknað uppí tær hægru útbúgvingarnar. Kravið at koma inn á útbúgvingina er tí miðnámsprógv ella edv-útbúgvingarprógv á í minsta lagi líknandi stigi.
Líkur tú ikki hesi krøv, men hevur hollar royndir t.d. í edv-yrkinum, kanst tú søkja um undantaksloyvi.

Útbúgvingin tekur 2 ¼ ár.

Tá ið upptikið verður, verður fyrst og fremst dentur lagdur á prógvgóðsku, vinnuligar royndir og kunnleika í enskum og støddfrøði. Í støddfrøði krevst stig B, sum tó kann takast sum stakroynd í byrjanini av lestrinum.

Vilt tú vita meira um útbúgvingina vinarliga hygg á heimasíðuna http://heima.olivant.fo/~jonsen ella vend tær til skúlan tel 317177 eftir tilfari.
Innskriving: Í seinasta lagi 5. mai 2001 á serligum umsóknarblaði, sum fæst á skúlanum.

FØROYA HANDILSSKÚLI
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn, Tel: 318813, Fax: 313374

P/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
RASMUSSEN & WEIHE

Tvøroyrar Havn

Við hesum verður starv sum havnameistari lýst leyst at søkja.
Somuleiðis verður lýst eftir hjálparfólki.

Persónslýsing:
- Er fyrikomandi
- Er kundavinarligur
- Er ágrýtin
- Arbeiðir væl saman við øðrum
- Kann laga seg eftir skiftandi arbeiðstíðum
- Fyrimunur at duga enskt og hava teldukunnleika

Skrivlig umsókn, saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal vera Rasmussen og Weihe P/F í hendi í seinasta lagi 11. mai 2001

RASMUSSEN & WEIHE
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018

Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

Anna og Knud Lambaa's legat

Legatið varð sett á stovn av Annu og Knud Lambaa, Tórshavn, við tí endamáli at veita skyldfólki teirra styrk í sambandi við bókliga, handverkara- ella aðra útbúgving.

Øll, sum eru skyld við Annu og Knud, kunnu søkja legatið um styrk.

Umsóknarbløð fáast við at venda sær til undirritaða.

Umsóknir mugu vera undirritaða í hendi áðrenn 1/6-2001.

Poul Hansen, adv.
Áarvegur 1
Box 52
110 Tórshavn

Søkt verður eftir avloysara fyri

Dagrøktarmammu

í farloyvi at byrja sum skjótast.

Umsóknir skulu vera dagrøktini í hendi seinast 10. mai.

Dagrøktin í Sjóvar Kommunu
490 Strendur

Keyp og søla av skipum

• Skipamekling
• Skipaumboðan
• Skiparakstur

Meira fæst at vita á:
Tlf. 318531 • Fax 319369

TOR SHIPPING
Niels Finsensgøta 23 · Box 1252 · 110 Tórshavn
e-mail: torship@post.olivant.fo www.torship.com

Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy og Klaksvíkar HF-skeið

Frá 1. august 2001 er eitt **ársvikariat** leyst at søkja í:
Stødd-/alisfrøði

Setan fer fram sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara (YF). YF-umsóknarbløð fáast frá skúlanum (tlf.: 444024, faks: 444797) ella frá Yrkisfelagnum.

Umsóknin skal **stílast til Føroya Landsstýri, Mentamálastýrið**, og vera rektaranum í hendi **í seinasta lagi 10. mai 2001**.

Adr.:
Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy
Att.: Sámal í Skorini, rektari
Kambsdalur
530 Fuglafjørður

Samfelagsmøtir í Klaksvík

Samfelagsmøtir verða – um Gud vil – í Klaksvík á hvítusunnu, 1.–3. juni.

Skrá yvir møtini o.a. verður kunngjørt seinni.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

Samkoman í Betesda

Skrivstovufólk

Til skrivstovu okkara verður søkt eftir skrivstovufólki at arbeiða hálvan dag.

Skrivligar umsóknir verða at senda til skrivstovu okkara, har nærri upplýsingar fáast um starvið.

P/F BYGGITEK
Stiðjagøta 3 · Box 1189 · Tlf. 317585 · FO Tórshavn

Sosialurin
www.sosialurin.fo